gult22 cyan22 magenta22 svart22



# Hyggja frameftir

**Hóast Flemming Østergaard sjálvandi frøddist um meistaraheitið, so hevur hann longu snarað eyguni móti komandi árinum, har nýggjar avbjóðingar bíða**

DM-GULL
*Álvur Haraldsen/ Jákup Mørk - Odense*



*Fyri á leið trimum árum síðani hevði felagið eitt virði upp á einar fimm milliónir. Í dag verður tosað um eina hálva milliard*

Sunnudagin kundu sjónvarpshyggjarar hjá TV3 síggja ein óvanliga kenslubornan Flemming Østergaard. Tá dómarin bríkslaði fyri seinastu ferð, og meistaraheitið var veruleiki, fingu kenslurnar frítt at fara. Stóri maðurin lat tárini rulla niður eftir andlitinum, og duldi heldur ikki fyri, at talan við hesum hevði verið um ein dreym, sum nú var runnin út.

- Tað er einki at siga til, at sunnudagurin var serligur, segði Østergaard, tá vit skiftu orð við hann eftir seinasta dystin.

- Alt tað, sum eg havi arbeitt við seinastu fýra árini, riggaði brádliga saman. Tað var eins og hesi fýra árini runnu fram fyri mær aftur.

- Dagurin í dag er tó eisini stórur. Vit hava jú fingið steyp og gullmerki, og tað eru sjálvandi sear fegnir um.

## Ikki av løttum

Hóast meistaraheitið nú er heima, so heldur stjórin í felagnum tó ikki, at nøkur orsøk er at hvíla á rósunum, sum nú eru at hóma,

- Nei, tað kunnu vit sjálvandi ikki. Hjá okkum er bara at njóta nú'ið, og so mugu spælararnir sleppa í summarfrí. Vit hava jú stórar uppgávur komandi ár, og skulu millum annað út í Europa at spæla.

Tað er tó ikki bert á ítróttarliga økinum, at Flemming Østergaard ætlar, at felagið framvegis skal verða sjónligt. Tey fýra árini, sum hann hevur verið í felagnum, eru karmarnir broyttir heilt nógv.

## Eitt stórt virki

Seinastu tíðina hevur verið tosað um enn fleiri víðkanir. Millum annað sigst ein sjónvarpsstøð at vera ávegis, men hesi tíðindi verða so ikki váttaði av Østergaard.

- Tað er soleiðis í Danmark, at um tú hevur ætlanir um at gerast størri, so skalt tú geva Fondsbørsini boð fyrst, so tað fái eg ikki svarað. Tað stutta av tí langa er tó, at tey, sum kenna meg og FCK, tey vita av, at tað eisini framyvir fer at henda nakað alla tíðina.

- Talan verður tó ikki um nøkur fantasiprojektir av nøkrum stað, men tað sum vit plaga at rópa kontrolleraður vøkstur.

- Tað, sum vit hava sýnt seinastu árini á vinnuliga økinum, hevur so ikki verið heilt býtt. Fyri á leið trimum árum síðani hevði felagið eitt virði upp á einar fimm milliónir. Í dag verður tosað um eina hálva milliard, so vit hava í øllum førum nógv at vera errin um.

- Sum eg segði í áðni, so hava vit tó ikki tíð at taka okkum av løttum, samstundis sum vit siga øðrum, hvussu dugnalig vit eru. Tað er nú, tá vit eru komin á toppin, at vit skulu sýna dugnasemi. Tað snýr seg um at prógva hetta, meðan vit eru á oddinum, og tá mótgongdin kemur. Tí taki eg tað ógvuliga róligt nú, og royni bara at byggja víðari á okkara sonevnda »succes«, sigur Flemming Østergaard at enda.

# Farin í summarfrí

**Todi Jónsson fór longu í summarfrí sunnudagin, og tí tóktist hann heldur róligari enn sunnudagin, tá FCK mikukvøldið kundi taka ímóti stóra steypinum, sum er sjónliga tekinið um meistaraheitið hjá felagnum**

DM-GULL
*Álvur Haraldsen/ Jákup Mørk - Odense*




*Nú hevur mann líka sum fata tað betri, segði Todi Jónsson, tá hann mikudagin hevði havt hendur á stóra steypinum*

Samanborið við sunnudagin var tað ein heldur róligari Todi Jónsson, sum mikukvøldið júst hevði havt hendur á steypinum, sum sjónliga teknið´um, at hann nú er danskur meistari í fótbólti.

## Nýggjar avbjóðingar

Heldur ikki hesa ferð var Todi millum leikararnar á vøllinum. Nú meistaraheitið var heima, var eingin orsøk at taka nakrar kjansir, og tí byrjaði summarfrí hansara sunnukvøldið.

- Ja, hesin dagurin er eitt sindur øðrvísi. Nú hevur mann líka sum fata tað betri. Vant seg við at vera meistari. Sunnudagin og mánadagin skuldi mann venja seg við tað, men nú er tað nakað heilt annað.

Spurdur, um tað nakran tíð var upp á tal, at hann skuldi taka lut í dystinum í dag, svarar Todi, at tað var tað ikki.

- Nei, nei. Eg fór í summarfrí sunnudagin. Tá var alt allíkavæl avgjørt. Eg vandi eitt sindur hvønn dag, so tú kanst kalla tað eitt slag av summarfrí við venjing.

Jú. Sum danskur meistari bjóðar komandi heystið Toda og teimum eina rúgva av avbjóðingum. Møguleiki er at vinna seg í bólkaspælið í Champions-League, har veruliga stóru mótstøðuliðini bíða, og tá kappingarárið byrjar longu seinast í juli-mánaði, verður ikki tann stóra hvíldin, sum leikararnir fáa, áðrenn farast skal í holt við fótbóltin aftur.



# Alt varð staðfest



*Eftir dystin runnu allir leikararnir yvir til tann partin av stadion, har FCK-áskoðararnir sótu, og so byrjaði gullveitslan enn einaferð*

**Hóast moyrir, so megnaði FCK eisini at vinna seinasta dystin á árinum, og eftir dystin kundu teir so enn einaferð lata seg heiðra av áskoðarunum**

DM-GULL
*Álvur Haraldsen/ Jákup Mørk - Odense*

Keypmannahavnarbúgvar royndu av álvara at gera innrás í Odense mikukvøldið. Kanska ikki sjálvan býin, men í øllum førum stásiliga stadionið hjá Odense Boldklub, vanliga nevnt OB.

Teir í høvuðsstaðnum vóru nevnliga longu meistarar, og tað einasta sum restaði, var nú staðfestingin av sigrinum. At tey í Odense skuldu síggja, at FCK er so nógv tað besta liðið. Bæði tá tað kemur til spælið á vøllinum og millum áskoðararnar.

Skoraði í seinasta dystinum

Høvdu viðhaldsfólkini hjá FCK roknað við, at tey hjá OB fóru at geva skarvin yvir uttan víðari, og boyggja seg fyri meistarunum, so fóru tey tó fullkomuliga skeiv.

Frá fyrsta bríksli gjørdi blá/hvítu herðurin hjá OB vart við, at tey vildu stuðla liðnum í hesum seinasta dystinum. Sangirnir dundu frá báðum pørtum, og hóast tað onkuntíð var torført at halda skil á orðunum, sum vórðu rópt oman á vøllin, so tóktist greitt, at úrvalið av sangum var stórt hjá báðum pørtum. Meðan FCK-bólkurin dýkti á við »Vi elsker FCK«, svaraður OB aftur við at rópa »De elsker kun sig selv«. Heldur argandi vildi onkur kanska hildið, men sum áskoðari var tað stuttligt at kunna staðfesta, at dysturin kundi fáast frá hondini uttan rok av nøkrum slag.

Meðan áskoðararnir soleiðis høvdu barst um yvirtakið uttan fyri vøllin, royndu spælararnir at stríðast á sjálvum vøllinum. Her varð skjótt greitt, at hóast nýkosnu meistararnir uttan iva høvdu ein part av sunnudegnum eftir í beinunum, so ætlaðu teir sær avgjørt ikki at bróta longu røðina sum ósigraðir.

Onkur upptrekk vóru eisini til møguleikar, og eftir tíggju minuttum, kom so málið, sum at kalla staðfestið meistaraheitið. Zuma hevði bóltin á brotsteigarmarkinum, og tá hann legði hann tvørturum, kom Michale Mio Nielsen við fullari ferð, og hamraði bóltin í málhornið.

Ikki kann sigast annað enn, at tað var hóskandi, at tað gjørdist Mio, sum skoraði málið. Liðformaðurin er spakuliga við at eldast, og møguliga var talan um seinasta dystin hjá honum yvirhøvur. Hetta er tó ikki avgjørt enn, men í øllum førum fekk hetta áskoðararnar at syngja um, hvussu væl Mio átti málið uppiborið. At hallarvarpartin so samstundis segði frá, hvussu skilið var í hinum dystunum hendan dagin, tóktist als ikki at rína við hjá teimum, og hví skuldi tað eisini tað? Teir høvdu longu tryggjað sær heitið, og høvdu sostatt als ikki tørv á at laga seg eftir úrslitunum hjá hinum liðunum.



*Umframt at vinna DM-gull, fekk FCK eisini fleiri aðrar viðurkenningar. Roy Hodgson varð fyri sættu ferð í yrkisleið sínari kosin ársins venjari, meðan Zuma varð kostin ársins leikari í superliguni*

## Show

Tí gjørdist talan í seinna hálvleiki eisini nógv meira um eitt show, heldur ein vanligan fótbóltsdyst. Aldan varð rullistartað nakrar ferðir, og at enda kom verulig ferð á hana, so hon einar fimm ferðir runt.

VIP'arar og tíðindafólk sluppu heldur ikki undan alduni, og meðan taktfastu F-C-Kååå rópini geylaðu kring vøllin, hoyrdist alsamt minni til OB-viðhaldsmenninar.

Tá dysturin loksins varð blástur av, tók gleðisrómurin ongan enda. Sungið var av allari megi, meðan DBU-formaðurin, Poul Hyldgaard, handaði spælarunum gullmerkini, áðrenn hann at enda handaði Mio risastóra silvursteypið. Steypið, sum staðfesti, at FCK eru meistarar.



*Eisini hesa ferð vóru føroyskir áskoðarar at síggja við vøllin, og hóast Todi ikki var við, so varð merkið drigið fram*